## DAGSINS MEINING

# Kuldin gevur gleði og óhugna

Nú er avkavað, og landnyrðingurin kínir so turrur og berligur køldu oyggjunum. Hann kom so knappliga í ár, at vit vóru ikki rættuliga fyrireikað. Bilrøðirnar eru langar í høvuðsstaðnum. Fólk við óskøddum bilum seinkað ferðsluni óneyðugt og teirra líkasæla ella natni festir í manga illbønina. Og aftan á kemur setningurin: - Tað skuldi verið forboðið vil lóg, at bilførarar fara óskøddir út í ferðsluna.

Hann sigur frá stormi í vikuskiftinum og aftur meira kava, men fyrst skal ein hitabrúgv bloyta tað heila og gera ruðuleikan fullkomnan í ferðsluni. Børnini stórhugna sær. Kring landið verður skreitt og gjørdir kavamenn. Børnini eru dubbað í heitum og deiligum kavadraktur, sum meira minna um rúmdarbúnar enn vanlig klæði. Men turr eru tey, og reyðu kjálkarnir boðan frá sunnheit og vælstandi.

Og tað kavar eisini í Afghanistan. Onkuntíð av møkum, onkuntíð við heglingi og altíð við bumbum, sum knúsa og sora, oyða og merkja børn fyri lívið, Børn, sum vit sleppa at síggja dagliga á altjóðan fylgisveinasjónvarpinum, teirra ræðsla og sorg fylgir okkum inn í dreymin. Og hvat er eftir at bumba, ella sum smádrongurin spurdi pápa sín: - Babba, nyttar tað nakað at bumba telt?

Og kuldin úr Ruslandi hevur sent eina tungu niður í Palestina. Tað er kalt í fátæku palestinesisku bygdunum og kuldin úr norði ger sorgina enn svárari.

Í fjølmiðlunum eita tey deyðu yvirgangsmenn, men hjá teimum eru tað brøður og systrar, mammur og pápar, systkinabørn og vinir. Tey eru deyð og fara ongantíð at smílast aftur.

Og tað er kalt í nýbygdunum hjá ísraelsmonnum, bygdunum í palestinesiskum landi. Hóttanin hongur allatíðina, nær kemur næsta kúlan, nær kemur næsta bumban, nær standa tey fyri skotum, nær fara tey at missa síni næstu?

Tað er kalt í heiminum í løtuni og á evropeiska meginlandinum byrja fólk at seta spurnartekin við, um tað er rætt í 21. øld at løna eyga fyri eyga og tonn fyri tonn. Er ongin annar modernaður máti at loysa heimsins trupulleikar. Ella sum bretski forsætisráðharrin úttalaði fyrr í vikuni um Palestina. "Einaferð mugu fólk fara at tosa saman, spurningurin er bara nær og áðrenn tosað verður saman, heldur yvirgangurin fram.

Nær fara føroyingar at seta spurnartekin við allan harðskapin úti í heimi. Vit um miðan aldur minnast virknar føroyingar í sjeytiárunum, sum høvdu eina meining um hendingar, eisini uttan fyri okkara lítla dunnuhyl.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið 2001 – Lat ta føroysku røddina, sambandsrøddina, umboða teg á fólkatingi

**Johan Dahl**
*Í Vági 07.11.2001*



Tað verður nú frá Tjóðveldismonnum fokuserað nógv uppá, at FØROYSKA røddin skal umboða føroyska fólkið á fólkatingið,- og har skulu teir náa tað sum teir ikki hava verið førir fyri tey seinastu 4 árini í samgongu, - nevniliga at fáa breiðar semjur við danir.

Nei, góðu føringar, latið tykkum ikki villeiða av hesum monnum, tí alt tað teir higartil hava víst í verkið er so langt burtur frá tí sum fólkið vil , og tann demokratiska rættin at latað fólkið talað í maj,- hann tordu teir heldur ikki at geva okkum .

Hví kunnu vit so spyrja okkum sjálvi???

Svarið er sera einfalt, - nevniliga tað at Føroyska fólkið vildi ikki tað sum teir vildu, - teir ræddust úrslitið!!!

Fólkatingsvalið hesaferð verður ikki einans spurningurin um at fáa Føroysku røddina, - SAMBANDSRØDDINA valda inn á fólkating, og harvið verða við til at byggja land - men eisini eitt val har vit sum veljarar mugu vísa loysingarflokkunum hvar vit standa í forhold til Ríkisfelagskapin við Danmark og Grønland.

Áheitan mín til Ung sum Eldri er: Verið við til at tryggja framtíð tykkara,- fari á val 20 . novembur og seti krossin við eitt av umboðum SAMBANDSFLOKSINS, vit tæna tykkum best.

# Tollfrí søla



**Zakarias Wang**

Viðhvørt verður ført fram, at tað er ein áhugabólkur í Føroyum, sum beinleiðis hevur áhuga í at vit halda fram við at vera narkotiseraði av tí danska stuðlinum.

Her er ikki talan um tey gomlu, tey sjúku og tey arbeiðsleysu. Tey hava jú øll kent sviðan av tí órættvísu skipan, sum danir og teirra húskallar hava bygt upp her.

Heldur ikki er talan um tann vanliga skattgjaldaran. Hann fær einki burtur úr hesi skipan.

Eins lítið er talan um øll tey, sum fáast við framleiðslu av vørum til heimamarknaðin og til útflutnings. Øll hesi hava bara ampa av tí danska studninginum. Hjá nøkrum verður hesin ampin partvíst minkaður av tí at politikararnir geva studning, men tað veit ein og hvør vinnulívsmaður, at sleppa politikarar at blanda seg upp í vinnulívið, so verður úrslitið vánaligt. Politikarar kunnu hava skil á nógvum, men at taka tær knøppu avgerðir, sum takast skulu í fyritøkum, um tær skulu standa seg í kappingini, hava teir so til fulnar prógvað, at teir ikki hava skil á.

Nei, tann einasti parturin av vinnulívinum, sum kann tykjast at fáa nakað burtur úr tí danska studninginum, eru tær fyritøkur, sum fáast við innflutning.

Tað er jú greitt, at teir pengar, sum koma inn i landið, skulu út aftur. Fyri tað mesta fara teir út aftur við at vit fara í handlarnar og keypa vørur. Tí kann tað tykjast fyri henda bólkin, eins og tey koma at missa inntøku, um so er, at vit gerast eitt sjálvstøðugt ríki og skulu liva av okkara egnu framleiðslu.

Er hetta so? Um so var, so hevði tað verið at skilt, um øll hesi fólk velja teir flokkar, sum virka fyri, at vit framvegis skulu vera danskir penganarkomanar.

Men tað sum vit skulu minnast til er, at um so er, at vit ikki fingu nakrar pengar uttanífrá, so hevði tað ligið nógv betri fyri hjá okkara vinnulívi at farið til verka og økt um sínar inntøkur. Hetta hevði vaksið um útflutningsvirði okkara, og tað sum útflutningsvinnan gav av sær, hevði funnið fram til kassaapparatini í handlunum eins væl og teir donsku pengarnir fyrr.

Eitt annað, sum vit skulu minnast til, er, at gjørdust vit eitt sjálvstøðugt ríki, so skuldu handilsmenninir í Føroyum skipað sítt egna handilskamar. Hetta hevði fingið limaskap í Internatinal Charmbers of Commerce, sum hevur sæti í Paris. Í hesum felagsskapi verður ásett, hvørji øki eru í heiminum, tá ið tað kemur til agentur.

Sum er, eru vit í einum øki, sum fevnir um Grønland, Føroyar og Danmark. Í hesum øki skal ein fyritøka hava ein agent, og av tí at 98% av umsetninginum er í Danmark, er tað vanliga har agenturin býr og fær sína inntøku, eisini fyri tað sum selt verður í Føroyum.

Tá vit vera okkara egna øki, skal agenturin búgva her. Agentprovisiónin kemur tí at gerast ein inntøka, sum føroyska handilsvinnan fer at fáa.

Men er ikki alt hetta við agentum burturdottið, nú vit hava internet og ein og hvør kann leita sær fram til leverandørar um allan heim?

Sjálvandi er hetta ein partur av nútíðar veruleika, men meginparturin av handli fer framvegis fram gjøgnum agentar, og tað, at vit sleppa at vera fyri okkum sjálvar, fer tí at geva nógvum dugnaligum føroyskum handilsmonnum eyka møguleikar.

Tað er sostatt ikki svart í væntu fyri føroysku handilsstættina í einum frælsum landi.

Sjálvur havi eg annars altíð verið fyri at tað rætta er at skipa Føroyar sum eitt fríhandilsøki, so at tað ber til hjá okkum at keypa tollfrítt her heima hjá okkum sjálvum. Tað hevði kunnað økt munandi um umsetningin, tí so sluppu fólk frá at fara av landinum fyri at keypa bíligt aðrastaðni, men heldur komu útlendingar til Føroya fyri at keypa bíligt her. Tað hevði eitt nú komið væl við hjá tí nýggju Norrønu og Atlantsflog.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.




## VIÐMERKINGAR

# Fólkatingsvalið: ein hugsjónarlig uppgerð

**Jóannes Eidesgaard**
*fólkatingsmaður*



Í roynd og veru snýr fólkatingsvalið eins væl og komandi løgtingsval seg um eina hugsjónarliga uppgerð millum tað at velja eitt nationalt frælsi ella eitt framhaldandi og betra persónligt frælsi fyri tann einstaka føroyingin. Sjálvt um hesi kunnu ganga hond í hond, um tol og skil verður brúkt, so er samgongan samd um, at tað eru tað ikki stundir til. Teir hava valt tað nationala frælsi, og so má tað persónliga frælsi og alt annað koma í aðru røð. Javnaðarflokkurin hevur í meira enn 70 ár arbeitt fyri tí mótsatta, har vit seta persónliga frælsi hjá hinum einstaka í hásætið.

Persónliga frælsinum til eitt virkið lív, har øll eiga møguleikar, og har øll eiga sømdir. Persónliga frælsinum, sum gevur hvørjum einstakum møguleikar uttan mun til, hvussu eins fíggjarligu fortreytir eru og uttan mun til, hvussu eins førleikar annars eru. Eitt persónligt frælsi, sum í roynd og veru er eitt lívsfrælsi.

Neyvan finst ein vakrari politisk kós enn júst hendan. **Kósin móti menniskjanum í samfelagnum og ikki ein kós móti samfelagnum við menniskjum.**

Lat okkum taka tvey dømi, sum vísa hugsjónarliga munin millum ynski hjá samgonguni og okkara.

Tá fólkapensjónin varð samtykt á løgtingi í 1959, tá segði kendur fólkafloksmaður, at eitt skuldu tingmenn vita, at tóku teir undir við uppskotinum hjá P. M. Dam og Javnaðarflokkinum um eina fólkapensjón, so varð loysingin útsett í minst 50 ár. T.v.s. hann gjørdi tað til eitt val millum loysing og betri kor hjá pensjonistunum.

Fyri ikki so langari tíð síðan segði Høgni Hoydal í samrøðu við Jyllands-Posten, at nú var umráðandi at halda fast um fullveldiskósina, tí annars fóru politikkarar at geva eftir fyri tí skríggjandi tørvi, sum var til játtan til eitt nú okkara sjúkrahúsverk. T.v.s. hann gjørdu tað eisini til eitt val millum loysingina og betri umstøður á hesi týðandi vælferðartænasti.

Og hetta er framvegis munurin, og hetta er framvegis tað, sum alt snýr seg um eisini komandi fólkatingsval. Tað snýr seg snøgt sagt um hugsjónir. **Valið millum menniskjað og fullveldið.**

Og rikni politikkurin hjá fullveldissamgonguni ber síni týðiligu prógv. Teri hava av sínum eintingum lagt pengar til síðis, so fullveldisætlanin kundi fíggjast. Teir hava stolt ignorað alt tað, sum hetta samfelagið skríggjar eftir á flest øllum økjum. Teir fáa saktans sovið teirra søta blund hvørja nátt fyri bíðirøðum til røktarpláss, tørvandi játtan til sjúkrahús, alt ov lágum pensjónum, neyðarrópum frá teimum við skerdum førleika o.s. fr. Tí teir hava valt nationala frælsi fram um alt annað. Fyri teir er tað bert tað, sum telur.

Sum so ein erlig søk, so leingi teir sjálvir standa við tað og greiða fólkið frá rætta innihaldinum og teimum fylgjum, tað førir við sær. Men tíverri gera teir tað ikki, tí teir royna at billa okkum inn, at einki verður øðrvísi.

Men fyri veljaran má valið standa greitt. Er tað fullveldið ein velur við teimum fylgjum, sum harav fylgja, so er bara at velja samgonguflokkarnar. Men ynskir veljarin eina framhaldandi menning av okkara samfelag, soleiðis at Føroyar gerast eitt uppaftur betur land at búgva í, so er at geva Javnðarflokkinum sín dyggan stuðul 20. nov.

# Fólkaatkvøðan íð var av ongum

**Atli Hansen**



Tá ið henda samgongan legði frá landi fyri uml. 3 ? ári síðani, var málið at gera Føroyar til eitt fullveldi, áðrenn valskeiðið var av. At loysa Føroyar burtur úr ríkisfelagsskapinum.

Men ein avgjørdur løgmaður lovaði samstundis, at ongar broytingar skuldu fara fram á ríkisrættarliga økinum, uttan at tað var ein breið undirtøka til hetta millum Føroya fólk. Og hesa undirtøku ætlaði man so at staðfesta gjøgnum eina fólkaatkvøðu.

Sum tíðin leið og okkara gonga av samráðingarfólki við jøvnum millumbilum fór til Danmarkar og kom aftur uttan úrslit, so minkaðu eisini møguleikarnir fyri at hava nakað at hava ein fólkatkvøðu um. Nyrup segðist ikki at vilja skilja okkara umboð og teirra ørindi.

Hetta endurtók seg nakrar ferðir. Men tíðin gekk undan hjá samgonguni, um bara okkurt skuldi spyrjast burtur úr hetta valskeiði. Tí gjørdi man av at enda at taka donsku samráðingarleiðarnar í álvara. Við eini skiftistíð upp á 4 ár kundu vit sleppa at taka okkum burtur úr ríkisfelagsskapinum.

Avgjørt varð at spyrja Føroya fólk og dagurin fyri fólkaatkvøðu settur til at vera 26. maj. Og so kenna vit øll restina av søguni. Sum dagurin fyri fólkaatkvøðuni nærkaðist gjørdist samgongan alt meira fjálturstungin, tí tað ljóðaði, at málið fór at falla.

Bebbaræddur fyri sínum egna barni tók løgmaður avgerðina um fólkaatkvøðu aftur og øll lyftir um at søkja sær breiða undirtøku fyri broytingum í ríkisfelagsskpinum vóru fokin.

Andstøðan dyrgdi eftir at fáa hesa fólkaatkvøðu kortini. Fyri at lata Føroya fólk sleppa at siga sína hugsan um fullveldistilgongdina og fyri at reinsa luftina, soleiðis at tað politiska systemið aftur kundi fara undir at gera okkurt meira skilagott. Men løgmaður segði nei. Her skuldi eingin fólkaatkvøða vera.

Men nú hevur so Nyrup útskrivað val. Og hetta valið kunnu so allir føroyingar gera til ta fólkaatkvøðuna, sum vit ikki fingu í vár. Her kann Føroya løgmaður ikki forða okkum í at geva okkara hugsan til kennar.

Vit í Sambandsflokkinum fara at heita á veljararnar um at atkvøða fyri einum av okkara valevnum og út yvir at skula geva okkum sessin aftur í Fólkatinginum skal hvør einasta atkvøða eisini teljast sum ein protest ímóti fullveldistilgongdini hjá hesi samgonguni.

Velji Sambandsflokkin.

# Ríkisfelskapurin byggir álit

**Jóhan Petur Johannesen**

Tað er onki at takað seg aftur í, at ríkisfelsapurin byggir álit. Tey sum ynskja loysing, kalla Danmark fyri ein mótpart ella fígginda, men fyri okkum sambandsmenn er talan heldur um bróðurskap, sum Petur M Dam sáli segði á sinnið: "Det er broderskap imellem to nationer". Vakari kann tað neyvan sigast.

**Fólkatingsumboðanin**

Tað sum er so gott við okkara fólkatingsumboðan er, at hon gevur okkum møguleikar at fortelja dønum og grønlendingum um viðurskiftir hjá okkum, og vit fáa eisini betri innlit í donsk viðurskiftir, so at vit í sátt og semju kunnu loysa tær uppgávur, sum liggja fyri framan, bæði fyri okkum her heima, og fyri alt ríkið. Vit kunnu eisini brúka okkara umboðan til at greiða teimum donsku og grønlendsku umboðunum frá um okkara viðurskftir, so at tey betur skilja, hvat ið rørir seg í fólkinum her heima hjá okkum.

Sambandsflokkurin er einasti flokkur her á landi, ið vil varðveit okkara umboðan, og tí er tað ein sjálvfylgja, at vit fáa okkara umboðan tann 20. nov.

# Eingin sjálvstøðug tjóð?

**Hans Birgir Hansen**

Tað kann ikki sigast at Føroyar eru ein sjálvstøðug tjóð, tá vit ikki umsita allan avgerðarrætt yvir land og sjóøki og undirgrund og loftrúmi yvir Føroyum!

Tað kann ikki sigast, at Føroyar og arbeiðandi fólkið er demokratiskt/fólkaræðisliga skipað/við nærdemokrati/kommunalum sjálvstýri, sum støðan er í dag.

Tað kann vísast til tær miðsavnandi stýrisskipanir/ løggávur/dagligu mannagongdir/kunngerðir/reglugerðir, ið er tillagað arbeiðs/starvsfólki í umsitingum!

Tað kann vísast til tær búskapar, samfelags, fakligar, politiskar, mentanarligar, handils, vinnuligar og sosialar skipanir/løggávur/ dagligu mannagongdir v.m.!

Tað sama er við skipað lands/kommunalt/alment/ privat framleiðslu/flutnings/tænastu virksemi/ úti í kommunum, og við tí rikna familjupolitikkinum!

Tað hevði verið uppá tíðina, at borgarar/veljarar/ landspolitikarar taka annað skinn um bak og fáa sett seg inn í viðurskiftini og virksemið!

Tað er ikki minst galdandi við skipaðar langtíðar fíggjar- og íløguætlanir land, kommunur, almenna, privata, ið ganga skal yvir eitt longri áramál!

Tað er neyðugt at greiða ábyrgdarbýtið millum land, kommunur, almenna, privata og skipa nærdemokrati, kommunala sjálvstýrið kring alt landið!

Tað er ikki minst galdandi, tá vit fáa skipað økisskrivstovur úti í útjaðarøkjunum undir eftirliti av høvuðsskrivstovum hjá miðfyrisitingum í Havn!

Tað er uppá tíðina at fáa endurskoðað/dagført galdandi skipanir/lógir/mannagongdir/kunngerðir/reglugerðir/innan umsiting áðurnevndu!

Tað er ikki minst galdandi at fáa tillagað umsitingarliga virksemið at tæna viðskiftafólki eins!